gult24 cyan24 magenta24 svart24



KÍ-HB 0-2 (0-2):

# Havnarmenn sektaðu mistøkini hjá KÍ

**Klaksvíkingar vístu heilt øðrvísi hugburð, enn teir gjørdu ímóti GÍ, men tað var ikki nóg mikið ímóti HB, sum í 1. hálvleiki hevði fleiri stórar møguleikar**

1. DEILD
*Jóannes Hansen*



*KÍ var við yvirlutan í klassisku uppgerðini í Klaksvík. Sera sigandi er Hjalgrím Elttør eisini kringsettur av mótleikarum á myndini*

*Mynd: SjH*

Tað var summar í Klaksvík sunnudagin. Heiður himin, stilli og nógv fólk á gøtum og strætum. Út á seinnapartin vóru tað havnarmenninir, sum smíltust mest út eftir Fornagørðum og út í Klaksvíkina, og so bilti tað ikki so nógv, at ovbyrjaða strandferðsluskipið var ein hálvan tíma seinkað.

HB hevði fingið tað, sum teir komu eftir. Støðið til 2–0 sigurin løgdu teir í 1. hálvleiki. Tá høvdu teir væl størri breidd í álopsspælinum enn mótstøðumenninir, og teir spældu seg til einar tríggjar stórar málmøguleikar. Men teir megnaðu ikki at umseta nakran av hesum møguleikunum til mál.

HB fekk bæði málini eftir persónlig mistøk hjá heimamonnunum. Tað fyrra kom, tá eitt korter var farið. KÍ misti í uppspælinum í vinstru, og tríggir av HB monnunum, sum stóðu sterkastir í myndini, syrgdu fyri uppspæli og máli. Vagnur Mohr Mortensen sendi úr høgru langan bólt fram um miðjuna, Uni Arge var hægstur og longdi við høvdinum til Jón Róa Jacobsen, sum dróg eitt sindur, áðrenn hann av brotsteigarmarkinum smekkaði flatt framvið Meinhardi Joensen í KÍ málinum.

Seinna málið fekk HB tríggjar minuttir undan steðginum. KÍ roynd at byggja upp varð steðgað eitt sindur frammanfyri miðjuna, Rúni Nolsøe stakk fram í vinstru til Rógva Jacobsen, sum var púra blankur, tí KÍ verjan var á veg fram. Álpopskendi miðvallarin, sum onkuntíð hevur staðið sjónskari í myndini í Klaksvík, enn hann gjørdi sunnudagin, var púra kaldur, tá hann lyfti upp um eitt sindur tøvandi KÍ málverjan, og so tóktist alt avgjørt.

### KÍ tók ikki av

Klaksvíkingar vóru nógv meiri avgjørdir og ágangandi ímóti HB, enn teir vóru, tá gøtumenn fóru við øllum stigunum úr Klaksvík. At KÍ kortini ikki megnaði at fáa mál og harvið stig burturúr komst fyrst og fremst av, at teir spældu ímóti einum liði, sum – sjálvt um Allan Mørkøre var skaddur og tískil als ikki var við – var javnt væl mannað á øllum plássum. Og harafturat tordi HB í 1. hálvleiki at hava nógv fólk frammi á vøllinum.

KÍ royndi frá fyrsta bríksli at leggja trýst á aftastu ketuna hjá HB. Hugsanin tóktist vera, at miðverjarnir skuldu kroystast at gera mistøk. Onkrar hálvvandamiklar støður stóðust burturúr, serliga eftir at Eyðun Klakstein var farin í vinstra borð, og Hjalgrím Elttør var komin í høgru síðu, men upplagdu málmøguleikarnir vóru heilt fáir. Nýggi jugoslavin, Alexander Djordjevic, vísti, at tað ivaleyst fer at verða fongur í honum. Hann hevði eitt fínt fluktskot, sum Bárður Johannesen, ið var tryggur í málinum, bjargaði væl, og tað var hann, sum í síðsta álopinum undan steðginum tiltuskaði KÍ eitt brotsspark.

Hetta var lagnuløtan hjá klaksvíkingum. Harley Bertholdsen, sum var tryggur úr ellivu metrum í fjør, sendi til høgru fyri seg sjálvan, men tað hevði HB málverjin lisið av, og so var hálvleiksstøðan 0–2.

### Lítið veiggj í

Tað verður altíð ein hypotetiskur spurningur, hvussu tað hevði hilnast, um klaksvíkingar høvdu minkað um munin dygst undan steðginum. Ivaleyst høvdu teir havt fingið áskoðararnar meiri við sær, og teir høvdu havt orsøk at rokna við møguleikanum.

Eftir steðgin spenti Tomislav Sivic álopsbogan og fór frá 3–4–3 og til 3–3–4. Hann setti seg sjálvan og Ova Nysted inn, og Allan Joensen varð settur aftur í miðverjuna, har Jan Andreasen rættuliga tykist vera komin upp í snúðningar.

KÍ hevði bóltin meiri, enn teir høvdu havt í 1. hálvleiki, men málmøguleikarnir vóru heilt fáir. HB, sum sjálvsagt tóktist nøgt við støðuna, tók seg – ivaleyst ótilvitað – aftur á vøllin, bíðaði og dúvaði upp á skjótálop.

Klaksvíkingar høvdu ilt við at spæla seg ígjøgnum. Í 2. hálvleiki tóktist tað liggja betri fyri í vinstru, men akkurát sum ímóti GÍ, so var tað mesta høgravent, um tað yvirhøvur var í borðunum, at tað gekk fyri seg.

Sum tíðin leið, vórðu alt fleiri bóltar sendir høgt í HB brotsteigin. Tað var matur fyri Hans á Lag, sum – hóast hann leingi hevur verið burturi frá við skaða – stóð sterkur í myndini. Onkrar støður tóktust spentar frammanfyri HB málverjan, men tað kendist alla tíðina sum um HB hevði megnað at táttað í aftur – um tað hevði verið neyðugt.

Sjálvandi vóru klaksvíkingarnir ikki nøgdir í góðveðrinum. Men um teir megna at varðveita hugburðin, tá teir fara at spæla ímóti liðum, ið ikki hava somu styrkina, sum HB hevur, so fara teir ivaleyst at fáa mál, og so fer stigatalvan kanska eisini at broytast.

**KÍ-HB 0-2 (0-2)**
0-1: Jón Rói Jacobsen 22
0-2: Rógvi Jacobsen 44

**Dómari:** Niklas á Líðarenda (GÍ)

KÍ: Meinhard Joensen – Atli Danielsen, Jan Andreasen, Niclas Niclassen – Harley Bertholdsen, Allan Joensen, Símun Joensen, Fríðin Ziskason – Eyðun Klakstein, Alexander Djordjevic, Hjalgrím Elttør

HB: Bárður Johannesen – Vagnur Mohr Mortensen, Hans á Lag, Jóhannis Joensen, Janus M. Joensen – Hallur Danielsen, Rúni Nolsøe, Rógvi Jacobsen – Jón Rói Jacobsen, Uni Arge, Andrew av Fløtum.

B36 – KÍ 1-1 (0-1):

# Liðini býttu stigini

**KÍ hevur enn sín fyrsta sigur til góðar eftir tveir dystir í landskappingini, tá dysturin í Gundadali millum B36 og KÍ endaði við javnleiki 1-1, sum var eitt rættvíst úrslit**

2. DEILD
*Jákup Mørk*

Tað var B36, ið legði harðast út í landskappingardystinum móti KÍ leygardagin. Heimaliðið legði nakað av trýsti á KÍ málið og spældi seg eisini fram til onkran málmøguleika miðskeiðis í fyrra hálvleiki. Hesir vórðu tó misnýttir, og so var tað KÍ, sum átti tørn.

Útiliðið hevði fleiri atsóknir á B36 málið, men antin bjargaði Rene Tórgarð í málinum ella beindi verjan bóltin burtur.

Fimm minuttir fyri steðgin eydnaðist tað KÍ at fáa hol á málskjótingina, og tað var tað fyrsta málið hjá KÍ í ár. Leon Bjartalíð fekk fatur á bóltinum beint frammanfyri miðjuna. Hann slapp at reka ótarnaður oman móti málinum, og nakað uttanfyri brotsteigin royndi hann seg við skoti, sum fór dygst upp í hornið.

Eitt vakurt mál, og KÍ kundi fara til hálvleik við eini eitt máls leiðslu, og tað mundi útiliðið verða væl nøgt við.

### B36 svarar straks aftur

Tað var øllum greitt, at B36 ætlaði ikki at lata klaksvíkingar fara norðuraftur við øllum stigunum. Tí vóru teir naskir at byrja við, og tað gav úrslit beinanvegin.

Bara fýra minuttir inn í seinna hálvleik javnaði heimaliðið. Rógvi Róin fangaði bóltin uttalaga í brotsteiginum, og hann sendi innfyri eftir jørð, har Ragnar Poulsen stóð púra leysur og bara skuldi seta fótin á.



*Tað endaði við javnleiki, tá teir næstbestu hjá B36 og KÍ hittust í Gundadali leygardagin*

*Mynd: Álvur Haraldsen*

Fleiri mál komu ikki í dystinum, men bæði liðini høvdu tó málmøguleikar, sum væl kundu givið mál. Tað eydnaðist ikki, og tí fingu liðini eitt stig í part, og tað var kanska rættvíst samanumtikið.

Eftir góðu byrjanina við einum sigri á Sumba á útivølli, megnaði B36 ikki at fylgja hesum sigrinum upp. Havnarmenn skulu næsta vikuskifti til Tvøroyrar. TB hevur enn ongan dyst vunnið, so teir vera uppsettir at vinna tann dystin.

KÍ hevur higartil spælt tveir javnleikir, so teir hava enn ein sigur til góðar í ár. Næstu ferð verður tað ímóti GÍ á heimavølli. GÍ hevur enn einki stig, so tað skuldi verið lag á manni at fáa fyrsta stigið til høldar.

**B36 – KÍ 1-1 (0-1)**
0-1: Leon Bjartalíð
1-1: Ragnar Poulsen

gult25 cyan25 magenta25 svart25



# Fyrstu næmingarnir byrjaðir

**– Í gjáramorgunin fóru 20 næmingar undir eina nýggja útbúgving í Føroyum.**

SKÚLASKAPUR
*Áki Bertholdsen*



*Hetta eru teir fyrstu næmingarnir á nýggja almanna- og heilsuskúlanum í Suðuroynni. Standandi frá vinstru eru tær Susanne Høeg Olesen, skúlaleiðari av Tvøroyri, Erna Hovgaard, Judith Árnastein, Aleth Blåsvær og Tonnny Jacobsen, allar úr Havn, Eydna Johansen úr Sandavági, Gurli Høgnisen úr Vestmanna, Anna Helena Múller úr Kvívík, Johanna Fløtt av Eiði, Hildigarð Djurhuus úr Fuglafirði, Sonja Hammer úr Syðrugøtu og Vigdis Nolsøe, lærari, úr Porkeri.*
*Húkandi frá vinstru eru tær Sigrun H. Magnussen úr Runavík, Helena Berthelsen av Strondum, Selma Gullaksen úr Klaksvík, Judith Poulsen úr Klaksvík, Kertin Jacobsen úr Klaksvík, Jørghild Eið úr Vági, Sólrun Lisberg úr Sumba, Hildigarð Jacobsen av Tvøroyri, Súsanna Malena Nolsøe úr Dali og Arndis Nicolajsen úr Skopun*

Í gjár byrjaði skúlagongdin í nýggja almanna og heilsuskúlanum í Suðuroynni.

Sostatt er enn eitt kapittul lagt afturat føroysku skúlasøguni, tí hetta er fyrstu ferð, at tað ber til at taka almanna- og heilsuútbúgvingar í Føroyum.

Fyrstu næmingarnir, sum eru tiknir inn á skúlan, er ein flokkur av heima-hjálparum, sum skulu hava útbúgving sum almanna- og heilsuhjálparar. Hetta eru konur, ið hava verið heimahjálpir í minst trý ár hesi seinastu fimm árini og sum hava arbeitt minst 24 tímar um vikuna.

Næmingarnir eru úr øllum landinum. Hvat heimarøktini viðvíkur, eru Føroyar býttar sundur í øki og tað eru tey ymsu økini sjálvi, sum hava sent heimahjálpirnar á skúlabonk.

Men av tí, at tær hava so drúgvar royndir sum heimahjálpir, varir útbúgvingin hjá teimum bara 26 vikur, men tær eru í starvsvenjing í gott helvtini av tíðini.

### Lagaliga byrjan

Fyrsta skúladagin í gjár fingu næmingarnir eina lagaliga byrjan. Byrjað varð klokkan 9 í gjáramorgunin, tá ið borrðreitt var við morgunmati á skúlanum lagið varð gott og tey trivu eisini í onkran sang.

Men longu áðrenn døgverða var tað álvari, tí tá byrjaði undirvísingin. Av álvara byrjaði skúlagongdin kortini ikki, fyrrenn nú í morgun.

– Hetta síðsta hálva árið hava vit arbeitt hart fyri at fáa alt at rigga, segði skúlaleiðarin, Susanne Høeg Olesen, tá ið hon beyð næmingunum vælkomnum í skúla í gjáramorgunin.

Hon segði, at tá ið tey løgdu útbúgvingina til rættis, høvdu tey tikið útgangsstøði í eini skipan, tey kendu og laga hana til føroysk viðurskifti, tí her eru umstøðurnar á mangan hátt øðrvísi enn tær eru í øðrum londum.

– Men nú skal tað standa sína roynd. Vit eru til reiðar og við uppsmoygdum ermum røkka vit eisini á mál, segði hon.

Hon vónaði, at útbúgvingin fer at menna næmingarnar fakliga og persónliga. Og hóast 26 vikur kunnu tykjast longi, væntaði hon, at tá ið tey stóðu við prógvinum í hondinum, fóru tey at halda, at tað var alt ov stutt, tí tey ætlaðu eisini at tíðin á skúlanum, skuldi knýta vinabond og felagsskap ímillum næmingarnar. Og stuttligt skuldi tað eisini vera.



*– Hetta er eitt nýtt og spennandi tíðarskeið í tykkara lívi, sum nú er byrjað, segði Susanne Høeg Olesen, skúlaleiðari, tá ið hon beyð fyrstu næmingum á almanna ðg heilsuskúlanum vælkomnum*

### Ongin trupulleiki

Tá ið skúlin varð settur á stovn, var tað stóra kjakevnið, at hann lá ov illa fyri á Tvøroyri.

Men tað halda næmingarnir ikki. Teir, vit tosaðu við í gjáramorgunin hildu ikki, at tað var nakar tvørleiki at fara til Suðuroyar at ganga í skúla. Tvørurímóti var tað onkur ið sá hetta sum eina kærkomna og spennandi broyting í gerandisdegnum, tí hetta var nakað nýtt og tað kundi eisini vera mennandi. Tey tóku tí ímóti hesum tilboðnum við opnum sinni.

Í øllum førum er tað léttari at fáa innivist í Suðuroy, enn tað er í Havnini og hjá tí eina næminginum, ið hevur eitt lítið barn við, er tað heldur ongin trupulleiki at fáa tað ansað um dagin.

Tað var bara ein sum helt, at hjá teimum, sum komu úr Klaksvík, var tað eitt sindur tvørligt at sleppa heim um vikuskiftini.....

Seinni í ár byrjar so tann longra útbúgvingin fyri tey, sum ongar royndir hava á økinum. Teirra útbúgvin byrjar 3. september og tá sleppa 24 næmingar í skúla.



*Teir fyrstu næmingarnir á nýggja almanna- og heilsuskúlanum í Suðuroy, fingu eina lagaliga byrjan. Skúlagongdini byrjaði í gjáramorgunin kl. 9, men fyrst á skránni varð morgunmatur og sangur. Fremst á myndini eru tær Sonja Hammer úr Syðrugøtu, Judith Poulsen úr Klaksvík, Sólrun Lisberg úr Sumba og Gurli Høgnisen úr Vestmanna*